VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin og leygardagin:
Fleyr til gul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 17 stig.



Veðrið sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av suðri og landsynningi og sirm ella mjørki av og á, men eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, týsdagin upp í stívt andøvsgul av norði. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 12 og 16 stig.

Fyri fyrstu ferð í seks ár síggjast floygdar ritupisur aftur

Riturnar bygdu stór og góð reiður, og tveir ungar vóru í flestu reiðrunum

FUGLUR
Bergur Olsen, Havstovan



Ritur og pisur í Stóru Dímun 15. juli í ár
Mynd: Eirikur Lindenskov

Seinastu seks árini er at kalla ongin ritupisa komin undan í Høvdanum í Skúvoy, men í ár kom vend í. Tað sá sera gott út ta fyrstu tíðina; riturnar bygdu stór og góð reiður, og tveir ungar vóru at síggja í teimum flestu reiðrunum, og ein vaksin fuglur sat hjá teimum.

Um hálvan juli kom ein broyting í. Tá hevur ivaleyst verið ov lítið av føði til báðar ungarnar, tí nú sótu teir einsamallir, meðan bæði foreldrini vóru úti og veiddu. Tá ið foreldrini, eftir langa tíð, komu inn við føði, var ein kapping ímillum ungarnar um at fáa sum mest, tí tær vaksnu riturnar gera onki fyri at býta javnt ímillum ungarnar. Endin var sum oftast, at tann eini ungin fekk maktina og allan matin, meðan hin doyði í hungri.

Tað minkaði tí skjótt burtur av ungunum, og nú teir vóru um at vera floygdir fyrst í august var í miðal annað hvørt reiður tómt og bert ein ungi í hinum reiðrunum. Hóast úrslitið ikki bleiv so gott, sum tað sá út til í fyrstani, so er tað tó besta úrslit síðani 2002, og tað góða útlitið fyri nebbasildina, gevur vónir um, at ritan fer at klára seg betur komandi árini.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	7
Nuuk	6
Qaqortoq	9
Ammassalik	11
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	14
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	12
Lerwick	14
Aberdeen	18
London	20
Tromsø	--
Bergen	19
Oslo	--
Stokkhólm	22
Keypmannah.	17
Helsinki	19
Moskva	15
Berlin	18
Warzawa	24
Kiev	27
Bukarest	30
Paris	20
Madrid	30
Róm	27
Malorca	28
Athen	31
Malta	32
Tunis	32
Beijing	29
New Dehli	34
Bangkok	31
Jakarta	31
Sydney	17
New York	26
Miami	31
Los Angeles	24
Meksikobýur	22
Panama	--
La Paz	13
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	16

LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



Síðstu nátt:
Eitt lágtrýst, 987 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga vestureftir og brúgvalagið við Føroyar fer norðureftir.

Komandi nátt:
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi grynnist. Lýggj luft rekur framvegis av suðri móti Føroyum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 02/08 kl. 06^{00} – 03/08 06^{00}. Hitin í gjár: 12,4°
Minsti hiti máldur í august: +0,4° -
Mesti hiti máldur í august: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 6,0 mm – mált frá 02/08 kl. 06^{00} – 03/08 06^{00}.
Avfallið higartil í august: 19 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

VESTFALLSKYRRINDI

4. august Mánin longst frá jørðini
6. august Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
6.aug	07:51	20:09	06:51	19:09	07:06	19:24	09:51	22:09	10:51	23:09	06:06	18:24	05:06	17:24	08:06	20:24	09:06	21:24	07:36	19:54	08:51	21:09
7.aug	08:27	20:45	07:27	19:45	07:42	20:00	10:27	22:45	11:27	23:45	06:42	19:00	05:42	18:00	08:42	21:00	09:42	22:00	08:12	20:30	09:27	21:45
8.aug	09:03	21:20	08:03	20:20	08:18	20:35	11:03	23:20	-	12:03	07:18	19:35	06:18	18:35	09:18	21:35	10:18	22:35	08:48	21:05	10:03	22:20
9.aug	09:38	21:56	08:38	20:56	08:53	21:11	11:38	23:56	00:20	12:38	07:53	20:11	06:53	19:11	09:53	22:11	10:53	23:11	09:23	21:41	10:38	22:56
10.aug	10:14	22:32	09:14	21:32	09:29	21:47	-	12:14	00:56	13:14	08:29	20:47	07:29	19:47	10:29	22:47	11:29	23:47	09:59	22:17	11:14	23:32